# Bollin og taskan

**Barnabók um hagamýs, sum liva vanligt nútíðar gerandislív**



ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur í hesum døgum út myndabókina Bollin og taskan eftir Ulf Sindt og Mati Lepp. Bókin snýr seg um hagamýs, sum liva vanligt nútíðar gerandislív. Í bókini lesa við um eitt húski: mammu og pápa og tvey børn: Bartal og lítlusystir, Bollan. Á veg heim frá arbeiði ein dagin keypir pápin eina stóra, fína tasku. »Hesa kanst tú saktans hava í nógv ár,« sigur mamman. Men lítladiddan, Bollin, ætlar sær nakað heilt annað við taskuni.

Hvat gert tú, tá ið barnið vil tað, som tykist órímuligt? Ja, ikki er lætt at gera av, tað ásanna bæði mamman og pápin og Bartal.

Ebba Hentze týddi bókina úr svenskum.

Bollin og taskan er 28 bls. í litum, innbundin og kostar kr. 90.

Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.

# Nýtt um ælabogafiskin

**Nú ber til at uppliva nýggj ævintýr við ælabogafiskinum**




ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Teimum, ið dámar væl kendu søguna um ælabogafiskin hjá Marcus Pfister, sleppa nú at spæla við ælabogafiskinum og uppliva nýggj ævintýr saman við honum og vinum hansara. Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur í hesum døgum út bókina Ælabogafiskurin, sum er klistri- og søgubók. Í bókini eru fleiri enn 50 klistrimerki, sum kunnu nýtast umaftur og umaftur, og fleiri eru úr glitrandi, almyndandi silvurpappíri.

Meðan søgan verður lisin, kunnu børnini sjálvi klistra myndirnar á blaðsíðurnar, og soleiðis hava tey ein avgerandi leiklut í søgugongdini.

Ein bók, sum heilt víst gevur børnum, ið eru 3 ár og eldri spennandi tímar og stimbrar skapandi evnini hjá børnunum.

Ælabogafiskurin - Klistri- og søgubók er 20 bls. og kostar kr. 49. Eyðna Magnussen hevur týtt. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.

Hjartans takk fyri sýnda samkenslu, tá góði beiggi mín, mammubeiggi og ommubeiggi okkara

Tvøroyri

doyði og varð jarðaður.

Takk til øll, sum hjálptu til og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna

# Kappast um at mynda summarið

**Ì sambandi við farna summarið, so skipar 3´arin fyri einari myndakapping, har fólk hava møguleikan at senda teirra summarmyndir inn. Endamálið er, at fólk skulu fáa meira burturúr myndunum hjá teimum, sigur Svanna Nørspang, fyrireikari**



*Svanna Nørspang og Sára Svabo Sørensen hava fingið nógvar myndir sendandi í sambandi við myndakappingina. Tó er pláss fyri enn fleiri, siga tær.*
*Mynd: Heri á Rógvi*

MYNDAKAPPING
*Heri á Rógvi*

Summarið er tann tíðini av árinum, tá flestar myndar verða tiknar. Tað er kanska tað góða veðrið, sum ger, at peikifingurin ferð eftir ferð trýstir á knøttin, soleiðis at enn ein summarmynd kann leggjast afturat savninum, og oftani eru tað børnini, sum eru í andgletti.

Tað er 3´arin í SMS, sum skipar fyri kappingini saman við Atlantic Airways og Sosialinum.

Tað er Svanna Nørspang, starvsfólk hjá 3´aranum, ið stílar fyri kappingini. Hon er sjálv útlærd krambakvinna við sergrein í foto og framkalling. Sjálv var hon í læru hjá SMS-FOTO, sum seinni gjørdist ein partur av samstakinum 3´arin. Eftir nøkur ár uttanlands, hevur vent nøsina heimaftur, og hon valdi at skipa fyri einari tílíkari kapping, tá royndirnar søgdu henni, at hetta var eitt gott hugskot. Ì sambandi við kappingina fær hon eisini góða hjálp frá Sáru Svabo Sørensen, sum lærur til krambakvinnu hjá 3´aranum.

Svanna sigur, at endamálið við kappingini er, at fólk kunnu fáa meira burturúr myndunum hjá teimum sjálvum. Samstundis sum tað kundi verið stuttligt at skapt eitt sindur av áhuga, og eisini heldur Svanna, at okkurt spennandi manglar innan øki.

### Ikki bara børn

Hetta er tann tíðin, tá myndirnar frá summarfrítíðini verða framkallaðar, tískil valdu tey at skipa fyri kappingini nú. Undirtøkan til kappingina hevur eisini verið góð, sigur Svanna.

- Tað eru fyrst og fremst barnamyndir, sum vit hava fingið, og ætlanin var ikki, at hetta skuldi vera ein barnakapping burturav, sigur Svanna.

Hon sigur, at summarmyndir sjalvandi er eitt vítt begrep, men myndirnar eiga á onkran hátt at vísa summarið. Eitt nú heldur hon, at tað so avgjørt er saknur á náttúrumyndum til kappingina hesaferð.

Sjálvandi er tað ein fyrimunur, um myndirnar eru »klárar« í staðin fyri »kornutar«, men tað er ikki tað besta myndatólið, sum vinnur kappingina, hóast tað altíð er fyrimunur at hava eitt gott tól, um tú altso dugir at brúka tað.

Eisini heitur hon á fólk, sum senda myndir inn til kappinga, at viðleggja ein brævbjálva við fríðmerki, fyri at fólk skulu fáa myndirnar aftur.

### Finala

Freistin at lata myndir inn til kappingina er 13. oktober. Útvaldar myndir hava og vera eisini at síggja í Sosialinum mikudagar. Vinnararnir verða kunngjørdir hin 20. oktober.

Tá allar myndirnar eru komnar inn, so fara dómararnir at avgera, hvør tær tríggjar bestu myndirnar eru.

- Dómararnir hava allir servitan innanfyri foto, og teir fara at hyggja eftir ymiskum, tá teir skulu gera av, hvør hinar bestu myndirnar eru.

Ì sambandi við myndakappingina, verða allar myndirnar hongdar upp á Torginum í SMS, har fólk eisini fáa høvi at síggja tær.

Tað vera eisini fólk frá Minolta í Danmark, sum koma at handa vinnarunum vinningarnar. Talan er um Minolta myndatól frá 3´aranum til nr. 2 og 3. Vinnarin kann hinvegin leggja leiðina til Danmarkar við Atlantic Airways.

# Lær teg at spæla fótbólt

**Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur í hesum døgum út bókina Lær teg at spæla fótbólt, sum kendi fótbóltsspælarin, Gary Lineker, hevur skrivað**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Nú er lagamanni at læra at spæla fótbólt, antin tú ert barn ella vaksin, nýbyrjari ella royndur spælari. Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur í hesum døgum út bókina Lær teg at spæla fótbólt, sum kendi enski fyrrverandi fótbóltsspælarin, Gary Lineker, hevur skrivað. Petur Páll Mikkelsen hevur týtt til føroyskt.




*Á síðu 19 ber til at lesa um, hvussu tú temur bóltin*

Við hesi bókini vil Gary Lineker vísa børnum og ungum, hvussu fótbóltsspælið er. Við stuttum teksti og nógvum fotomyndum sæst stig fyri stig, hvussu tú eigur at læra teg alt tað grundleggjandi í heimsins best umtókta spæli: reglur, at sparka, skalla, verja málið og ymiskar liðskipanir. Eisini ber til at lesa um útgerð, vøll og leikreglur, og brot úr fótbóltsøguni er eisini við.

Gary Lineker, sum var framherði á enska landsliðnum í nógv ár, sigur sjálvur: »Fótbóltur er eitt framúrskarandi spæl, og eg eri so heppin at hava verið við á hægsta stigi. Eg havi nógv góð minni frá tíðini, eg spældi við ensku liðunum Everton og Tottenham. Uttanlands var tað ein spennandi avbjóðing at spæla við spanska stórliðnum Barcelona. Eg havi lært í fótbólti, at tú bert fært tað burturúr, ið tú sjálvur leggur í. Bestu ráðini, eg kann geva, eru at vísa góðan ítróttaanda og njóta spælið. Eg vóni, at tit fáa gleði av at lesa bókina og fáa eins stóran stuttleika í fótbólti, sum eg.«

Lær teg at spæla fótbólt er 45 síður við nógvum litmyndum. Bókin er innbundin og kostar kr. 100 í bókahandlunum. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.



Alberto og Eyvindur:

# Hittust í Róm



*Alberto Lysy hevur ríkað tónleikaáhugaðar føroyingar við sínum violinspæli seinastu vikuna*

**Týskvøldið í Fuglafirði var seinasta konsertin við heimskenda violinsnillinginum Alberto Lysy, sum hevur spælt í øllum teimum kendu konserthølunum í heiminum. Heimskendi Alberto og føroyski listamaðurin Eyvindur Mohr eru gamlir vinmenn**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Hóast Alberto Lysy er ein tann fremsti tónleikarin í heiminum á sínum øki, so hevur hann eisini vinarbond í Føroyum. Alberto Lysy og Eyvindur Mohr hava verið vinmenn síðan 1972.

Eyvindur Mohr var í italska høvuðsstaðnum Róm í 1972, har hann gekk á listaskúla. Tá fór hann saman við vinmonnum á konsert hjá bólkinum Camerata Lysy, og eftir konsertina komu Alberto Lysy og Eyvindur í prát. Hetta førdi til vinarlagið teirra millum.

Síðani hevur bólkurin hjá Alberto verið í Føroyum tvær ferðir og havt konsertir. Seinast var í 1978. Tað er eisini Eyvindur Mohr, sum saman við Norðurlandahúsinum hevur fingið bólkin hjá Alberto til Føroyar.

### Spælt víða hvar

Alberto Lysy hevur verið víða um við violin sínari. Hann hevur spælt í Royal Festival Hall og Albert Hall í London, í Paris, Berlin og New York. Hetta ber boð um ein tónleikara, sum er høgt í metum kring allan heimin. Hann hevur eisini havt solospælið í so stórum orkestrum sum London Symphony orchestra. Og hann hevur avjørt livað upp til heitið sum heimskendur á ferðini í Føroyum.

Alberto Lysy hevur búð í Sveis síðan 1977, tá hann gjørdist næmingur hjá Yehudi Menuhin, sum hevði fingið eyga á tey serstøku evnini hjá Alberto. Menuhin setti á stovn ein skúla fyri tónleikarar, og her blómaði Alberto.

Í dag er Alberto lærari á hesum skúlanum í Sveis, sum hann saman við Menuhin hevur bygt upp. Harumframt spælir hann í bólkinum Camerata Lysy. Ein partur av hesum bólkinum er í Føroyum í hesum døgum.

Bólkurin hevur 16-20 strúkarar, men hann er ikki fullmannaður, nú hann er í Føroyum, tí hetta lat seg ikki hesuferð.

### Á frímerki

Argentinarar hava eisini Alberto frammalaga í huganum, hóast hann ikki býr har longur. Hann hevur nevniliga fingið andlit sítt á eitt frímerki í Argentina, og eitt slíkt frímerki hevur Eyvindur Mohr fingið frá Alberto.

Vit í Føroyum eiga at kenna okkum heppin at hava fingið ein so kendan violinist til Føroyar, og hann hevur givið fólki eina uppliving fyri lívið.

# Statoil fær rokning fyri dálking

DÁLKING
*Stefan í Skorini*

Í gjár kom fram, at oljufelagið Statoil hevði havt ein leka í einum røri á Viðarnesi. Nakað av olju er runnið á sjógv og hevur elvt til dálking á Havnarvág.

Boði Haraldson, býarverkfrøðingur, sigur, at Statoil kann vænta sær eina rokning fyri uppruddingararbeiðið, sum skal til fyri at beina oljuna av vegnum.

Hetta er vanlig mannagongd, og um haldgóð prógv eru til at vísa á dálkingarkelduna, so kann ábyrgdarhavandi vænta sær eina rokning.

Nógv hevur verið tosað um oljudálking á Havnarvág seinastu tíðina, og nú skal Statoil gjalda fyri ein part av henni. Hvussu stór rokningin verður er ikki


